## Brot úr 2001

# Sjórøvarar í Vágahavinum

**Mars: Boyur hjá útróðrarbátinum Volunteer vórðu skotnar við fuglabyrsu**

Útróðrarbáturin Volunteer av Toftum kundi komið illa fyri vestan fyri í seinastu viku. Meðan línan stóð, hevði onkur skorið eina boyu oman av og skotið hol á tríggjar aðrar.


*Boyurnar, sum hava verið fyri herverki, eru skotnar við vanligari høglbyrsu. Hol er á boyuni, og høglini liggja inni í boyuni*

Jack Højgaard, skipari á Volunteer, sigur, at hann ongantíð hevur verið út fyri slíkum øll tey mongu árini, hann hevur róð út. Og heldur ikki hevur hann hoyrt um tað fyrr.

Hann metir hendingina so álvarsliga, at hann hevur meldað hetta til løgregluna. Hann vendi sær eisini til Vaktar- og Bjargingartænastuna og boðaði frá tí, sum hent var.

Løgreglan í Runavík váttar, at teir hava fingið fráboðanina og meta málið sum herverk. Av løgreglustøðini verður sagt, at teir hava ongantíð havt slíkt mál fyrr.

Boyurnar, sum hava verið fyri herverki, eru skotnar við vanligari høglbyrsu. Hol er á boyuni, og høglini liggja inni í boyuni.

# Misnýtsla av stuðli til heilivág

**Apríl: Fólk, ið fáa stuðul til keyp av heilivági frá almannastovuni, hava funnið ein møguleika at misnýta henda stuðulin.**

Pensiónistarnir rinda tær fyrstu 400 krónurnar av kostnaðinum av heilivági í hvørjum ársfjórðingi, meðan Almannastovan rindar alt omanfyri. Nú hava teir funnið út av, at tað er snilt at keypa heilivág til fleiri ársfjórðingar í senn, og soleiðis kunnu pensiónistar spara pengar.

- Vit merkja tað týðiliga á arbeiðsbyrðini, tá ársfjórðingurin tekur at halla. Fólk koma inn at fylla goymslurnar. Fólk kunnu bunkra heilivág til eitt hálvt ár og soleiðis leypa tveir ársfjórðingar um, sigur Petur Oluf Joensen, apotekari í Havn.

Tá fólk leggja undir seg til hálvt ára nýtslu, sleppa tey undan at keypa heilivág í tveir ársfjórðingar. Soleiðis sleppa tey eisini undan at gjalda tær 400 krónurnar, sum tey av røttum eiga at gjalda hvønn ársfjórðing.

Hesa snildi hava fólk, ið hava tørv á nógvum heilivági, fyri langari tíð síðani funnið útav at nýta til egnan fyrimun.

# Hassjpípa sløddist í barnagarði

**Mai: Spæliplássið hjá Drotning Margrethu barnagarðinum í Klaksvík er ótespilig sjón mánamorgnar**

Tá starvsfólkini í Drotning Margrethu barnagarðinum í Klaksvík koma til arbeiðis mánamorgnar, vita tey, hvør fyrsta uppgávan á degnum er.

Tey mugu út á spæliplássið fyri at kanna, um nakað er har, sum kann verða til vanda fyri børnini.


*Ein heimagjørd hassjpípa varð funnin á spælipláss-inum í barnagarði*

Og vanligt er, at starvsfólkini mugu rudda hópin av fløskubrotum og óruddi av vegnum, áðrenn tey næstan 100 børnini í barnagarðinum sleppa út at spæla. Fyri viku síðani funnu starvsfólkini í barnagarinum eina heimagjørda hassjpípu, sum sløddist á spæliplássinum.

- Vit eru ógvuliga hørm um støðuna, men vit fáa lítið annað gjørt, enn at heita á ungdómin, um at lata verða við at fara so illa um spæliplássið hjá okkum, sigur Marjun Michaelsen, sum er leiðari í barnagarðinum.

# Bispur álopin av hakkara

**Apríl: Ein telduhakkari breyt inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn og misnýtt heimasíðuna hjá Stiftstjórnini til ymiskt**

Fyri stuttum fekk Føroya Stiftstjórn ein hvøkk, tá tey varnaðust, at alt ruggaði ikki rætt inni á heimasíðuni hjá teimum á intertetinum.

Ein telduhakkari hevði hakkað seg inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn, og út frá hesi heimasíðu hevði hann gjørt ymiskt, sum er strangliga bannað. Hakkarin sendi eitt skriv út, har hann nýtti nummar, adressu og pening hjá Føroya Stiftstjórn, har Føroya Stiftstjórn gav møguleikan at vinna fleiri mió. kr.

Í skrivinum stóð, at upprættar tú eina konto, og teknar tú teg sum lim hjá Føroya Stiftstjórn, hevur tú møguleikan at vinna stórar peningaupphæddir. Hakkarin hevði eisini lagt ymiskar ónærisligar myndir inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn. Hakkarin vildi ikki gera nakað heilt álvarsamt viðvíkjandi peningastuldri ella


*Onkur gjørdi seg inn á heimasíðuna hjá bispi*

stuldri av privatum tilfari, men bert at snýta og nýta heimasíðuna hjá øðrum.

Føroya Stiftstjórn hevur syrgt fyri, at slíkt ikki endurtekur seg, og hava tey nú bøtt um trygdarviðurskiftini inni á internetinum. Málið er

# Flogfar vendi aftur við sjúkum monnum

**Mai: Flogfarið hjá Maersk vendi sunnudagin aftur til Føroyar, tí nakrir føroyskir sjómenn vóru ógvuliga illa fyri umborð**

Sunnudagin stóð alt løgregluliðið, bjargingarliðið og sjúkrabilar tilbúnir á flogvøllinum í Vágunum. Orsøkin var, at flogskiparin hjá Maersk hevði boðað frá, at hann vendi aftur til Føroyar, tí seks sjómenn vóru vorðnir ógvuliga sjúkir umborð.


*Eitt Maersk flogfar vendi aftur til Vágarnar við monnum, sum ikki høvdu tað gott*

Flogfarið hevði verið umleið ein hálvan tíma í luftini, tá flogskiparin vendi aftur, tí hann tordi ikki at halda leiðina fram til Keypmannahavnar við álvarsliga sjúkum monnum umborð.

Seinni vísti tað seg at vera talan um tveir menn, sum vóru ógvuliga illa fyri vegna ovurnýtslu av rúsdrekka. Støðan gjørdist tí ikki so álvarsom, sum fólk vóru bangin fyri. Báðir menninir vóru fluttir á Landssjúkrahúsið.

# Riflukúlur súsaðu um oyruni

**Mai: Tá tveir menn stóðu og prátaðu á støðni í Kaldbak, lat onkur hinumegin fjørðin knappliga skot av móti teimum.**

- Eg hoyrdi knappliga okkurt súsa framvið okkum, og síðani brast hol á eina plastiktunnu, ið stóð einar níggju metrar burturfrá okkum. Nógv vatn var í tunnuni, so tað sprændi úr holinum frá kúluni, sigur Eyðun K. Vang úr Kaldbak.

Eini trý skot vórðu tilsamans latin av, upplýsir Eyðun, ið ikki er sørt skelkaður av hendingini.

Ein annar maður, ið býr har um leiðir, ringdi til løgregluna og boðaði frá tilburðinum beinanvegin. Lógarinnar varðmenn komu á staðið, og teir arbeiða nú við málinum.

Av løgreglustøðini verður upplýst, at kúlan er send niður til Danmarkar til kanningar, so staðfestast kann, hvat skotvápn talan er um. Annars hava teir ikki nakað ítøkiligt at ganga eftir í hesum málinum.

# - Eg kann lasta flogførini sjálvur

**Mai: Stjórin á Atlantsflog roknar ikki við, at flúgvingin hjá felagnum verður avlýst orsaka av verkfallinum hjá arbeiðarafeløgunum**

Flogferðslan til og úr Føroyum heldur fram hóast verkfallið, men helst verður tænastan merkt komandi dagarnar.

- Vit rokna ikki við, at verkfallið fær álvarsamar avleiðingar fyri flúgvingina. Vit ælta at flúgva, hóast talan kann gerast um seinkingar, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog.

Fólkini, sum lasta flogførini, eru farin í verkfall, men hetta fer ikki at forða fyri, at flogførini kunnu flúgva. Ein avleiðing kann vera, at ferðafólkini ikki fáa alt viðføri við, og at tænastan í sambandi við flúgvingina ikki verður, sum hon plagar at vera.

- Um tað verður neyðugt, so kann eg lasta flogfarið sjálvur. Eg eri stjóri og kann gera tað, sum eg havi hug til, sigur Magni Arge.

# Tungan feldi Tobba

**Juni: Litríki politikarin av Glyvrum segði farvæl til landsstýrissessin eftir 10 buldraligar mánaðir**

Politiski heimurin misti í fyrstu syftu ein av sínum litríkastu spælarum. Fyrsta dagin í juni mánaði gav Tórbjørn Jacobsen sær sjálvum reytt kort sum landsstýrismaður og segði upp.


*-Hetta hevur verið hart, langir dagar, sum hava gingið út yvir mínir nærmastu. Eg haldi ikki, at hetta hevur gingið úryvir meg sjálvan, tí mær hevur dámt starvið, segði Tobbi*

Nógv er hent síðan Tórbjrøn varð biðin um at gerast landsstýrismaður fyri Tjóðveldisflokkin fyri 10 mánaðum síðan uttanfyri bøgarðarnar í Kunoy.

Tórbjørn greiðir frá avrikunum, aftaná at hann hevur greitt pressuni frá, hvussu hann reint formelt greiddi løgmanni frá hóskvøldið í faksi, at hann ikki ynskti at halda fram í starvinum. Stórur dentur verður lagdur á, at ongin hevur trýst Tórbjørn úr starvinum.

- Eg havi tikið avgerðina sjálvur, málið hevur ikki eingang verið viðgjørt í flokkinum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

-Hetta hevur verið hart, langir dagar, sum hava gingið út yvir mínir nærmastu. Eg haldi ikki, at hetta hevur gingið úryvir meg sjálvan, tí mær hevur dámt starvið. Eg eri harmur um at fara, men her eru ongi tár.

Tórbjørn er farin frá, men hann verður ikki gloymdur beinanvegin í føroyskum politikki. Hann tók avleiðingarnar av síni egnu tungu og løgið skuldi verið, um tað ikki verður vigað sum nakað manniligt í manna eygum.



## Brot úr 2001

# Smádrongur fekk fløsku í høvdið

**Juni: Ein føroyskur áskoðari varð tikin av løgregluni undir landsdystinum millum Føroyar og Jugoslavia. Hann tveitti eina glasfløsku eftir løgreglumanni, men rakti ein smádrong í høvdið**

Tað var eitt sindur av hooligan dámi yvir landsdystinum millum Føroyar og Jugoslavia á Tórsvølli.

Almenna áskoðaratalið var 4.371, og flestu av hesum áskoðarunum skikkaðu sær væl. Men á áskoðaraplássunum aftan fyri málið, har trúgvastu føroysku áskoðararnir halda til, vóru tað ikki allir, sum dugdu at uppføra seg.

Ein maður, sum hevði fingið ov nógv inn um, tveitti eina glasfløsku eftir einum løgreglumanni, sum gekk framvið. Fløskan rakti ikki løgreglumannin, men hinvegin ein smádrong í høvdið.

Vaktarmaður fann fram til tann seka mannin, og eftir at hava tingast eina løtu fór løgreglan avstað við manninum, sum er skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

Formaðurin fyri føroyska áskoðarafelagnum, 12. manni, heldur lítið um hendingina, sum hann eisini var vitni til.

- Hasin persónurin hoyrdi ikki til okkum, og vit vilja heldur einki hava við slík fólk at gera. Vit leggja upp til at hava tað stuttligt, og tað er avgjørt ikki soleiðis, at tað skal ganga fyri seg, sigur Regin Egholm.

- At ein áskoðari tveitir eina fløsku á slíkum skilaleysan hátt, má ikki gerast ein vani, og vit kunnu bara ímynda okkum, hvat hevði hent, um fløskan endaði inni á vøllinum.

# Bitin í andlitið av óðum hundi

**Juni: Fýra ára gomul smágenta úr Vági hevur fingið stór sár í andlitið, eftir at hon varð bitin av hundi**

Ein smágenta í Vági fekk møguleika mein fyri lívið, tá ein hundur gjørdi seg inn á hana.

Hon var farin út, tá ið ein hundur leyp á hana og beit hana rættiliga illa í andlitið. Yvirvørrin og pettið upp ímóti nøsini er illa farið av bitinum. Summi av sárunum eru nokk so djúp.

Gentan var beinanvegin flutt á Suðuroyar Sjúkrahús, har skaðin varð kannaður, men har hildu tey ikki, at tað bar til at seyma, í hvussu so er í fyrstu syftu. Gentan skal aftur á sjúkrahúsið at verða kannað og at taka støðu til, hvussu skaðin skal viðgerðast.

Læknarnir hava sagt foreldrunum, at sárini helst fara at grøðast, men at okkurt arr fer kanska at verða eftir.

Tey vita ikki rættiliga, hvat hendi, tá ið hundurin beit. Sjálv hevur gentan greitt frá, at tað var ikki tí, at hon royndi at kela honum, ella tí at hon á annan hátt gjørdi hundinum nakað, at hann gjørdust óður. Hon hevur greitt frá, at hundurin kom bara rennandi ímóti henni og beit uttan ávaring.

# Kostar 100 krónur at gjalda eina krónu

**Juli: Innkrevjingin til Barsilsskipanina fekk nógv skot fyri bógvin, tá arbeiðsgevarar fingu fyrstu rokningina**

Nógv bendir á at Fíggjarmálastýrið er farið eina tonn ov langt í royndunum at fáa peningin til nýggju Barsilsskipanina kravdan inn so skjótt og lætt sum møguligt.

Ein arbeiðsgevari, sum hevur sett seg í samband við Sosialin, hevur goldið 400 krónur i løn í farna mánaði. Av hesum skal hann rinda 0,25 prosent til nýggju Barsilsskipanina. Hetta er samanlagt ein króna í umtalaða føri.

Hesa krónuna hevur arbeiðsgevarin fingið rokning fyri, men rokningin ljóðar uppá 101,00 krónur. Orsøkin er, at omaná ta einu krónuna, sum arbeiðsgevarin skal gjalda til Barsilsskipanina, skal hann gjalda 100 krónur í avgreiðslugjaldi. Í rokningini verður gjørt vart við, at upphæddin skal gjaldast innan sjey dagar - annars verður upphæddin innheintað við panting, stendur í rokningini.

- Hatta er láturligt. Høvdu hasar 100 krónurnar farið í Barsilsskipanina, so hevði eg einki havt ímóti tí. Men eg havi nógv ímóti at 1 króna fer í Barsilsskipanina og 100 krónur fara i landskassan, sigur arbeiðsgevarin, sum skuldi gjalda rokningina í seinasta lagi í gjár.

# Prædikan fyrireikað í Múla

**Juli: Ólavsøkuprædikan í ár verður fyrireikað í Múla. Hans Eiler Hammer, prestur, býr í eina viku í Múla í sambandi við útvarpsrøð**

Prædikan í dómkirkjuni ólavsøkudag í ár verður helst merkt av, hvussu tað er at liva á primitivan hátt tætt upp at náttúruni og uttan samskifti við umheimin.

Presturin, sum skal halda ólavsøkuprædikuna, luttekur nevniliga í løtuni saman við familiju síni og tveimum øðrum pørum í Robinson líknandi tiltakinum hjá Studio Pegasus, um at lívbjarga sær í útdeyðu bygdini, Múla, í eina viku. Uppihaldið í Múla skal síðani sendast sum útvarpssending í Útvarpi Føroya í vetur.

- Vit komu til Múla í gjár og skulu vera her í eina viku. Vit liva á primitivan hátt og skulu sjálv fáa allan mat til vega. Um eina løtu skal eg út at fiska døgurða, og annars mjólka vit og taka egg frá hønunum. Hetta er ein nógv ørðvísi gerandisdagur, og eg rokni við, at hann kemur at


*Hans Eiler Hammer í Múla, har hann tók lut í úvarpsrøð*

merkja ólavsøkuprædikuna hjá mær, sigur Hans Eiler Hammer, prestur, í fartelefonini úr Múla.

# Nýggj trygdartiltøk á ólavsøku

**Juli: Á ólavsøku í ár verður stórur dentur lagdur á at hava trygdartiltøk, um eitt óhapp skuldi komið fyri, so trygdin á ólavsøku er í lagi**

Jan Christiansen, borgarstóri í Havn, hevur saman við øðrum á býráðnum lagt størri dent á trygdina á ólavsøku í ár samanborið við undanfarin ár.

- Tá vælkendi midnáttarsangurin er á skránni, eru millum 7000 og 10.000 fólk savnað í miðbýnum, og tá kann ein neyðstøða lættliga koma fyri, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Jan Christiansen sigur, at tá so nógv fólk eru trunkað saman á so lítlum øki, er alneyðugt við trygdartiltøkum, og at serkøn fólk eru hjástødd, um eitt óhapp skuldi komið fyri.

- Vit ætla at hava sjúkrabilar til reiðar, og Reyði Krossur verður eisini til staðar. Tað hava vit til ólavsøkuna í ár mett at vera týdningarmikið, sigur borgarstjórin í Havn undan ólavsøkuni 2001.

# Mugu hava hurðarnar stongdar

**Juli: Fólk búsitandi í Smærugøtu vilja ikki hava fleiri sambýli ella bústovnar, har menningartarnað fólk búgva**

Fólk í Smærugøtu í Hoyvík mótmæla harðliga, at arbeitt verður við at keypa eini hús í gøtuni við tí endamáli, at menningartarnað flyta inn í tey.


*Fólk í Smærugøtu mugu hava hurðarnar stongdar, tí so nógv menningartarnað eru í grannalagnum*

Grannarnir vísa á, at longu nú eru tveir bústovnar í grannalagnum, og um henda ætlanin verður fullførd, so fara tveir bústovnar og eitt sambýli at liggja innanfyri 75 metrar frá hvørjum øðrum.

Hetta halda grannarnir vera ov mikið. Mark skuldi verið fyri, hvussu nógvir slíkir stovnar kunnu vera í sama øki, tí tað er tyngjandi fyri grannalagið. Tí hava nøkur húsarhald í Smærugøtu tikið stig til eitt skriv, har tey hava nakrar fyrispurningar og lýsa málið frá teirra sjónarhorni. Skrivið er sent landsstýrismanninum við Almannamálum og leiðaranum á Serstovnadeildini. Tey hava eisini savnað undirskriftir til skrivið.

Fólk í Smærugøtu, ið Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey vilja gera vart við trupulleikan, áðrenn húsini eru keypt, og áðrenn nøkur avgerð er tikin. Soleiðis vóna tey at sleppa undan, at nakað verður kroyst omanyvir tey.

Tey siga, at fleiri fólk í gøtuni vanliga hava hurðarnar stongdar, tí tey kenna seg ikki væl við so nógvum menningartarnaðum í grannalagnum. Tey halda, at slíkir stovnar skulu spjaðast runt um í Havnini.

# Sigldi einsamallur heimaftur til føðilandi

**August: 62 ára gamli Erik á Rógvi Hansen sigldi 8.200 sjómíl úr Virginia Beach til Havnar at vitja skyldfólk**


*Erik á Rógvi Hansen kom heim at vitja í egnum báti*

- Tað kundi gerast eitt sindur trivielt, og onkuntíð hugsaði eg við mær sjálvum, hvat hundan geri eg her - ja, eg kom enntá upp at skeldast við meg sjálvan.

Tað sigur 62 ára gamli føroyski amerikubúgvin Erik á Rógvi Hansen, sum er komin til Føroya at vitja á heilt serligan hátt. Hann sigldi hiðar einsamallur í báti.

- At koma inn í Vestmannasund og sigla framvið Vestmannabjørgunum var deiligt. Og so stevna inn á Havnina har eini 2-300 fólk tóku ímóti, og har eg sá familju, eg ikki havi sæð í nógv harrans ár, var ótrúligt fyri meg, sigur Erik, ið er vestmenningur av uppruna.

Komandi dagarnar fer Erik at fáa sær eina nógv tiltrongda hvíld, og so fer hann at taka sær av løttum í Føroyum næstu vikurnar. Hann hevur ongar ætlanir um at hetta skal vera seinasta ferð, hann er í Føroyum, men at hann fer at búseta seg aftur í føðilandinum er lítið, sum røkist fyri.

- Mær dámar væl í USA, og mær hevur eisini altíð dámt væl í Føroyum. Men tá eg flutti var tað mest tí at seg sá nakrar møguleikar har yviri, sum eg ikki hevði her. Og eg má siga, at tað hevur gingist mær væl har yviri.